# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar

7. mai fingu Anja Kristina Øster og Sigurjón Einarsson, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3810 gr.

10. mai fingu Halgerð Jacobsen og Leif Niclassen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4200 gr.

10. mai fingu Gudny og Brian Rasmussen, Kaldbak, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4000 gr.

13. mai fingu Joan Heinesen og Sonni Jacobsen, Norðoyri, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3200 gr.

14. mai fingu Rut Smith Láadal og Jóhannus Eysturtún Láadal, Toftir, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3200 gr.

16. mai fingu Mai-Britt og Hans Debes, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4400 gr.

17. mai fingu Katrin og Kristian Martin Petersen, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3575 gr.

**Brúdleyp**

Leygardagin 19. mai giftast Anja Petersen og Páll Holm Rituvík. Vígslan verður í Rituvíkar kirkju kl. 13:00. Opið hús verður á sjócafe´inið í Runavík eftir kl. 17:00 við nátturða og kakum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 19. mai 2007 giftast Sólgerð Hjørleifsdóttir, Kollafjørður og Sámal Petur Olsen, Toftir. Vígslan verður í Fríðrikskirkjuni kl. 13.30. Veitslan verður á Hotel Føroyum fyri innboðin.

Leygardagin 19. mai kl. 15.00 giftast í Fríðrikskirkjuni Susan Janusardóttir og Øssur Hansen, Toftir. Veitslan verður á Svangaskarði kl. 19.

Leygardagin tann 19. mai giftast Lív Skoubo og Yngvi Skaalum Guttesen. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 16. Veitsla verður fyri innbodnum í hølunum hjá Havnar Róðrarfelag kl. 19.

**Prógv**

11. apríl 2007 bleiv Hilmar Sveinbjørsson, Hvalba, avlærdur sum elektromekanikari hjá SP/F Eyðun Jespersen, Tórshavn. Lærumeistari var Ey›un Jespersen.

# Jógvan Isaksen, Klaksvík

## f. 20. november 1931 • d. 11. mai 2007



Seinasta fríggjadag, 11. mai 2007, andaðist Jógvan Isaksen úr Klaksvík 75 ára gamal.

Jógvan, sum var føddur 20. november 1931, var sonur Annu, fødd Wolles úr Uppistovu á Trøllanesi, og Joen Fr. Isaksen, Jógvan í Beiti, úr Leirvík, eisini nevndur Billu-Jógvan, av tí at mamman æt Billa.

Systkini vóru Bodil, Korintha, Suffía, Ruth, Sigvør og Finnbogi. Jógvan var triðelstur.

Jógvan royndi longu sum skúladrongur sjólívið við pápanum sum skipara. Jógvan var sjómaður fyrstu árini eftir skúlagongdina í Klaksvík. Eitt skifti var hann í innanoyggja farmasigling við Poppy, sum Kjølbro átti, og sum Malvinus í Vátutoft førdi. So var hann við Atlantsfarinum, sum pápin átti saman við Kjølbro, og sum Billu Jógvan sjálvur førdi. Eftir at pápin brádliga doyði í 1948 bert 51 ára gamal, vildi mamman hava Jógvan at vera heima. Tá arbeiddi hann hjá Skard, sum stoypti kai í Klaksvík, og tá gekk hann á motorskúla hjá Jóhan í Grótinum.

So var Jógvan aftur við Atlantsfarinum, sum mamman nú átti einsamøll. Hann var dekkari, motorpassari og kokkur. Millum skipararnar vóru Meinhard, pápabeiggin, og Kristian Olsen. Veturin 1951/52 gekk Jógvan til seturskipara hjá Fischer Heinesen, og veturin 1954/55 tók hann longdina. Hann var bestimaður við Atlantsfarinum, sum Poul Hansen reiddi út, og sum Júst í Túni og seinni Eiler Jacobsen førdu. Tað var í 1956 at Atlantsfarið við Júst sum skipara og Jógvani sum bestamanni, sum fyrsta føroyska fiskiskip í nýggjari tíð, var hin tiltikna túrin í New Foundlandi. Frá 1958 og fram til 1962 førdi Jógvan Atlantsfarið. Teir royndu í Grønlandi og New Foundlandi, og teir vóru á sild norðanfyri Føroyar. Ein vetur róði hann út við Solo, sum Jóannes hjá Dáva átti og førdi. Jógvan loysti okkurt skifti Jóannes av. Síðani var hann stýrimaður hjá Levi hjá Dáva, sum førdi línuskipið Stellu Mariu, og síðani førdi Jógvan Stellu Mariu,

Á heysti í 1964 fór Jógvan í land og gjørdist arbeiðsformaður á heilsøluni hjá J. F. Kjølbro. Hetta starvið røkti hann fram til 1985, tá ið hann saman við sváginum, Benna á Geilini, keypti Snørisvirkið, sum teir høvdu inntil 2003.

Fyrstu árini, eftir at hann var uppilagstur, dreiv Jógvan summarútróður við Eystnesi. Hetta var fyri Fiskirannsóknarstovuna. Setningurin var eitt nú at leggja lunnar undir rúsufiskarí eftir hummara. Onkrar túrar var hann við Stellu trolarunum á marknaði í Týsklandi, og hann førdi Jóannes Patursson, tá ið hann varð sigldur til Onglands til upphøggingar.

Jógvan hevði stóran áhuga fyri samfelagsmálum. Í 14 ár umboðaði hann Tjóðveldisflokkin í Klaksvíkar býráð. Hann var sóknarstýrisformaður í 1969 og býráðsformaður 1977-1980. Fýra ára skeiðið var Jógvan fulltíðar borgarstjóri og hevði tískil farloyvi frá starvinum á heilsøluni.

Hann hevði eisini mong álitisstørv. Millum nevndarsessirnar, sum Jógvan hevur røkt, er IRF, har hann var nevndarformaður, hann var stýrislimur í SEV, nevndarlimur í Klaksvíkar Sjómansskúla í 25 ár, Norðoya Bjargingarfelag (1972-2001) og í Sjóvinnubankanum (1989-1992). Eitt skifti var Jógvan til sjóforhoyrini, sum vóru á sýsluskrivstovuni í Klaksvík.

Jógvan giftist í 1957 við Harriet, dóttir Henrikku og Victor Danielsen, trúboðara, úr Fuglafirði. Tey giftust inn í Brekkuna til mammu hansara. Jógvan og Harriet fingu 4 børn, Jógvan, Henrikku, Hans Christian og Annfinn. Tey búgva øll í Klaksvík. Abbabørnini eru 9 í tali, 5 gentur og 4 dreingir.

Jógvan var léttur av lyndi og dugdi væl at siga frá. Hann var eisini trúgvur í Betesda. Saman við øðrum helt hann í nógv ár andakt á Norðoya Røktarheimi, og eisini ferðaðist hann seinastu vetrarnar kring landið saman við øðrum og helt møtir.

## MÍTT BARN

*Eg ynski ikki bara at halda meg í gongd.*
*Eg vil sleppa at tosa um mítt barn.*
*Eg vil sleppa at tosa um ta góðu tíðina – og ta ringu.*
*Eg vil sleppa at minnast – og ikki at gloyma. Eg kann ikki gloyma.*
*Eg vil sleppa at gráta – hví skal eg vera sterk?*
*Eg ynski, at tú lurtar eftir mær – og ikki skiftir evni.*
*Eg ynski tín stuðul - ikki at tú sigur at tú skilir .....*
*Eg veit, at tú kanst bert skilja, um tú eisini hevur mist eitt barn.*
*Eg hevði verið fegin um tú rætti mær eina hjálpandi hond -*
*við reingerð, matgerð ella at ansa børnunum...*
*Eg ynski bara, at tú ert her fyri mína skuld,*
*tí mær tørvar at tosa um mítt barn.*

**Høvundurin ókendur**



Lesið
Sosialin
-so eru tit við!